# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Andlát og jarðarferðir

**Anna Margretha Johannesen, Vestmanna**, andaðist sunnudagin á Landssjúkrahúsinum, 83 ára gomul.

**Doretha Jacobsen úr Fuglafirði** andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 15. februar, 83 ára gomul.

Kistan við **Henrikku Hansen í Sandavági** fer av Sýnini týskvøldið kl. 19. Jarðaferðin verður mikudagin kl. 14 úr Sandavágs kirkju. Tey, ið vilja minnast Henrikku kunnu lata Leguhúsinum í Nesvík eina gávu.

## Tøkk

Hjartaliga takk vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara elskaði maður, pápi, abbi og verfaðir

**Christen Joensen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðaður.
Takk til Hanus Simonsen prest, fyri troystarík orð í kapellinum, kirkjuni og fyri góð orð við jarðarferðina. Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravarar.
Ein serstøk tøkk til deild Á á Klaksvíkar sjúkrahúsi, ið vóru um Christen ta tíðina, hann var har, við góðari hjálp og umsorgan. Takk, at tit vóru so góð við hann.
Takk fyri blómur, kransar og gávur.
Eisini takka vit tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini og fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Klára, Jóan Petur, Dagfinn og Christel**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga tykkum øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara góði bróðir og gubbi

**Håkon Joensen**
doyði og varð jarðaður.

**Systkini við familju,**
**Høgni og Kristina við familju**

## Takk

Hjartaliga takka vit tykkum, sum á ymsan hátt mintust okkum á gullbrúdleypsdegi okkara 30. januar 2009.

**Kærar heilsanir**
**Jógvan og Ásvør**

# Fredag Kambsenni

**Føddur 12/6-1923 – Deyður 9/2-2009**


*Fredag saman við konuni, Edith*

Stillisliga fór hann mánamorgunin 9. februar inn til ta undurfullu hvíldina, sum hann dag og dagliga sang, spældi og vitnaði um við lívi sínum. Eg kom at kenna Fredag fyri 48 árum síðani í samband við konu mína, Judith. Fredag var mammubeiggi hennara. Tá vóru vit av og á inni á gólvinum hjá Hilmu, fyrru konu hansara, og honum, í Fuglafirði, og nutu samfelagið og blíðskapin frá teimum. Tey fingu børnini Marnhild og Carsey.

Fredag sigldi tá sum kokkur við millum øðrum skipunum hjá Skipafelagnum Føroyar, "Lómi" og "Bliki" millum Føroyar og Danmark. Eisini var hann kokkur við donskum frystiskipum, sum sigldu millum Europa og Amerika. Tað, sum undraði meg stórliga tá, var tann vilji og tað ágrýtni, ið hann legði fyri dagin, við teirri sjúku, ið hann hevði at dragast við. Hann leið nevniliga av eini ringari sjúku í rygginum, sum hann ongantíð slapp av við. Tiltikin góður kokkur var hann.

Nøkur ár eftir at Harrin hevði tikið Hilmu, konu hansara, heim í dýrdina, kom Fredag at kenna Edith, dóttir Ellu og Jógvan Højbro í Klakksvík. Tey giftust og Fredag flutti tá til Klakksvíkar. Tey høvdu nú livað saman í fyrimyndarligum hjúnalagi í úti við 30 ár, og øll hesi mongu ár hevur Edith verið honum ein dyggur stuðul. Tað kom nú heldur ikki illa við fyri Heygabúðina, at Edith fekk ein framúr góðan kokk til mann. Tað munnu vera fá húski í Klakksvík, sum ikki hava roynt knettini, frikadellurnar, rullupylsurnar og kjøtpylsurnar frá Fredagi, sjálvandi við stórari hjálp frá konu hansara Edith. Takast skal tó ikki frá Ellommu, ið var upprunin til tær sera væl umtøktu kjøtpylsurnar, sum eru víða kendar, eisini út um býarmark.

Fredag var ein sera væl dámdur og vinsælur maður, og verður stórliga saknaður av millum øðrum teimum í tilhaldinum í Víkunum, børnunum í barnagarðinum úti í Grøv, á røktarheiminum og sjúkrahúsinum, har munnharpan og mandolin ofta vóru havt á lofti. Serstakliga stórliga verður hann saknaður í BETESDA, sum var hansara andaliga heim, og har hann altíð var at finna til øll møtini, sum hann ofta tók lut í bæði við vitnisburði, sangi og munnharpuni. Øll minnast sangin nr. 620, sum hann ógvuliga ofta gav út: "Nærri, enn nærri, hjarta títt til, Frelsari drag meg, har vera eg vil ....."

Tá ið sjónin fyri nøkrum árum síðani fór at bila, lá tað ikki fyri hjá honum at koyra bil, og hóast Edith hevur koyrikort, so bleiv tað Jóhannes í Garðinum (Kanjon), sum við sínum bili tók sær av koyringini til og frá møtunum og aðra staðir, har teir funnu uppá at fara. Eisini gjørdu teir báðir nógv av at spæla saman – Jóhannes uppá banjo og Fredag mandolin. Einki er at ivast í, at Jóhannes fer at sakna hendan felagsskapin stórliga.

Fredag var sjáldsama familjukærur. Tey vóru 10 systkin, so tað er eyðsæð, at eitt stórt tal av makum, børnum og barnabørnum eru komin undan og eru spjadd kring alt landið, umframt eisini í Íslandi og Danmark. Sigast má, at tað er fyrimyndarligt, hvussu hjartaliga hann hevur hildið sambandið við øll hesi við líka – bæði við telefonsamrøðum og koyring kring alt Føroya land, umframt at ferðast uttanlands í somu ørindum. Eg eri sannførdur um, at øll hesi fara at sakna Fredag á serstakan hátt.

**Mikkjal á Bergi**

# Hans Jacob Mellemgaard 75 ár



Leygardagin 14. februar fylti Hans Jacob Mellemgaard í Klaksvík 75 ár.

Hans Jacob er svínoyingur, foreldrini vóru Ingrid, f. Jacobsen, og Henry. Tey fingu fimm dreingir, Hans Jacob er elstur, hinir eru: Símun Júst, Jarvin (andaðist í 1968, 30 ára gamal), Dánial og Árnmar.

Hans Jacob fór sum ungur til skips og í meira enn eina hálva øld hevur hann verið sjómaður. Mesta partin av tíðini var hann í langfarasigling og sigldi við Lauritzen til hann fall fyri aldurmarkinum fyri 15 árum síðani.

Eftir at Hans Jacob varð pensioneraður, hevur hann fingist við útróður og at egna.

Í 1956 giftist Hans Jacob við Herborg og eiga tey 6 børn.

Lesið Sosialin

**Dagurin**
**17. februar. Finandus**, deyður ár 603. Írskur abbati í kleystrinum Cloneenagh í Írlandi.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

**90 ára føðingardagur**
18. februar fyllir Edvard Petersen, Hósvík, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin í Kollafirði hjá Hervør og Tórgrím Hansen, Inni í Firði frá kl. 17.

**Diamantbrúdleyp**
Hósdagin 19. februar hava hjúnini Aslaug og Danjal av Rana verið gift í 60 ár. Dagurin verður hildin í Salem leygardagin 21. kl. 18.00. Øll eru vælkomin.